## DAGSINS MEINING

# Drekkið meira sigur Karsten!

Samgongan hevur veruliga kýtt seg fyri at goyma tann brølaran, tað var at skera blokkin so nógv niður eftir einum ári. Lógarfestu útreiðslurnar til Norðoyatunnilin standa als ikki á fíggjarlógini fyri 2003, og aðrar útreiðslur, ið kunnu væntast í 2003 standa heldur ikki á fíggjarlógaruppskotinum. Taka vit so óvanan við alt ov nógvum eykajáttanarlógum afturat, so fer als ikki at hanga saman hjá samgonguni.

Ein búskaparfrøðingur hevur í bløðunum eina skilagóða viðmerking til vakstrartølini hjá samgonguni. Er tað skilagott at vænta stóran búskaparvøkstur í Føroyum, samstundis sum partabrævamarknaðir úti í heimi eru uppá tað lægsta í fleiri ár? Eigur landið ikki at brúka eitt forsiktigheitsprinsipp, tá fíggjarlógin verður løgd?

Eitt er omanfyristandandi, men tað grefligasta dømi um undirbudgettering er, at man krevur ein inntøkuvøkstur hjá stovnum sum eitt nú Strandferðsluni og Rúsdrekkasølu landsins. Strandferðslan hevur longu staðfest ein ávísan avmatning í inntøkunum, so illa ber til at fáa ein inntøkuvøkstur, uttan at hækka ferða-seðlaprísin. Hvat Rúsuni viðvíkur, so má sølan ivaleyst upp, fyri at inntøkurnar skulu hækka. Hetta kann illa merkja annað, enn at føroyingar mugu fara at drekka meira av brennivíni og øli fyri at Karstensa fíggjarlóg skal hanga saman. Nú vita vit ikki, hvat fólk halda um hetta, men ikki var tað upprunaliga endamálið við Rúsdrekkasølu landsins, at tað skuldi verða ein mjólkimaskina hjá landinum.

Fólkaflokkurin er sær sjálvum líkur, men at Tjóðveldisflokkurin skal vera við til at argumentera fyri at halda lógarfestar útreiðslur uttanfyri fíggjarlógina, er ilt at skilja. Formaður Tjóðveldisfloksins brúkti meginpartin av tíðini hjá sær undir fíggjarlógarviðgerðini at útleggja søguna seinastu 20 árini uppá ein ikki sørt léttisoppakendan máta. Hvussu leingi kann man kóka suppu uppá eina skeiva útlegging av einum bankamáli? Fíggjarlógin i dag kemur ikki at hanga betur saman við at royna verður at øsa fólk upp um farnar tíðir. Gamaní segði formaður Tjóðveldisfloksins eisini, at hendan fíggjarlógin gjørdi teimum fullkomuliga til skammar, ið ávaraðu móti blokkniðurskurðinum. Tað er at taka munnin í so fullan at proklamera eina succes í ár 0, men tá úrslitini ikki skulu sleppa at tala fyri seg, so er tað nokk vegurin. Tjóðveldisflokkurin stóð seg betur við at taka konstruktivar spurningar og viðmerkingar til sín, ístaðin fyri altíð at skýra ting svarta talu og so tann klassiska viðmerkingin um, at fólk hava misskilt, hvussu tingini hanga saman.

Tjóðveldisflokkurin plagdi at duga væl at byggja brúgvar, og plagdu vinstravendu flokkarnir á tingi at duga væl at koma ásamt um raðfestingar á farnum fíggjarlógum. Í ringastu krepputíð fungeraðu sjúkrahúsverkið og skúlaverkið líka væl, sum í dag í bestu árum, takkað verið táverandi samgongu millum Tjóðveldisflokkin, Javnaðarflokkin og Sjálvstýrisflokkin. Munur er á!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Fíggjarlógin 2003 - eitt makkverk

**Magni Laksáfoss**
*Streymnes 8. oktober 2002*



**Fíggjarlógin fyri 2003 leggur upp til eitt hall í bestu búskapartíðum, hóast allar lógarbundnu útreiðslurnar ikki eru tiknar við og inntøkurnar eru yvirmettar. Harumframt ber fíggjarlógaruppskotið fyri 2003, eins og undanfarin ár, móti støðugt dýrari rakstri. Tískil koma vit longur og longur burtur frá einum sjálvberandi búskapi. Ikki kann sigast annað enn at fíggjarlógar-uppskotið fyri 2003 er eitt makkverk.**

Mánadagin í síðstu viku legði landsstýrið fram fíggjarlógaruppskotið fyri 2003. Ikki kann sigast annað enn at talan er um eitt ógvuliga ótrúðverdugt uppskot, sum hóast at allar útreiðslur ikki eru komnar við í uppskotið og sera bjartar ásetingar á inntøkusíðuni, ikki vísir annað enn 2 mill. kr. í avlopið. Ótrúligt at Landsstýrið ikki er meiri at sær komið enn at leggja tílíkt uppskot fram til viðgerðar.

### Fíggjarlógin hevur fleiri løg

Fíggjarlógin er bæði eitt stutttíðarambboð, har ásetingarnar í lógini vísa hvussu Landsstýrið ætlar at prioritera í einum ári, men er samstundis eisini eitt langtíðarstýringsambboð sum vísir hvørja kós Landsstýrið stingur út í kortið.

Av tí at tað er ringt at viðgera øll viðurskiftini í fíggjarlógini undir einum, vil eg her einans viðgera stutttíðarfíggjarlógina, meðan eg í tveimum fylgjandi greinum fari at viðgera kósina sum er løgd av sitandi samgongu og samanbera við kósina sum eigur at vera løgd.

### Útreiðslurnar

Raksturin á fíggjarlógini er vaksin meiri enn eina milliard seinastu árini undir hesi samgonguni. Sostatt skuldi vit trúð at nú vóru allar útreiðslurnar komnar við á fíggjarlógina. Men so er ikki!

Undirsjóvartunnilin til Klaksvíkar, sum bleiv skundaður niðan í tingið beint undan valið, er ikki komin við á fíggjarlógina. Talan hevur verið um at brúka av óbrúktum íløgujáttanum í 2002 fyri at pynta um úrslitið í 2003, men hetta er einans kreativ bókføring. Ein útreiðsla eigur at takast við har hon eigur heima, tí annars er ikki fult gjøgnumskygni í roknskapinum.

Í lógini um fast samband um Leirvíksfjørð stendur annars: *"§ 2. Játtanin til verkætlanina stór kr. 195 mió verður ásett á fíggjarlóg yvir eitt 6 ára skeið við kr. 32,5 mió árliga, fyrstu ferð í 2003."*, sostatt hevur løgtingið álagt Landsstýrinum at avseta pening til hesa íløguna í 2003.

Harumframt væntar peningur til at útbyggja havnina í Vági. Hetta er eisini ein samtykt løgtingslóg, og tískil eigur peningur at verða játtaður til hetta - talan er um 18,5 mill. kr.

At enda kann nevnast ein onnur týdningarmikil íløga sum hava verið frammi í kjakinum, fiskivinnuskúlin í Vestmanna, sum alt ov leingi hevur bíðað eftir eini útbygging, men sum onga íløgujáttan hevur fingið í 2003.

### Inntøkurnar í fíggjarlógini

Umframt at tað mangla útreiðslur, so eru inntøkurnar yvirmettar.

Inntøkurnar hjá Landskassanum eru í trimum - skattir, avgjøld og blokkstuðul.

Blokkstuðulin er tann einasta vissa inntøkan, sum er kend fammanundan fíggjarlógin verður løgd. Skattir og avgjøld eru óviss, tí tey broytast alt eftir konjunkturgongdini í búskapinum.

Seinastu árini hava búskaparliga verið avbera góð - gullár. Tískil hava inntøkurnar hjá Landskassanum verið undirmettar tá fíggjarlógin var løgd, tí vøksturin í búskapinum hevur verið sera stórur.

Hetta er at frøðast yvir, men vit eiga eisini at leggja í geyma, at hetta hevur verið støðan og er tíverri ikki støðan longur. Vit hava sæð tekin um at búskapargongdin er vend og eiga tískil at leggja fíggjarlógina eftir búskaparstøðuni.

### Metingin má undirbyggjast

Tá metast skal um inntøkurnar frá skattum og avgjøldum, er neyðugt at meta um útlitini fyri framtíðargongdina í lønargjaldingunum í ymisku vinnugreinunum. Frá fíggjarmálastýrinum fæst at vita, at eingin tílík meting er gjørd tá fíggjarlógini 2003 bleiv gjørd, men einans bleiv gitt at búskaparvøksturin fer at vera 6 %, tí *"hetta er minni enn undanfarin ár sum hava ligið um 10 %"*. Fyri at fáa eina undirbygda meting, sum fólk kunnu fyrihalda seg til, havi eg her gjørt eina tílíka. Myndin vísir gongdina í lønargjaldingunum í vinnugreinunum. Fyri betur at kunna yvirskoða vinnugreinirnar eru tær lagdar saman í tríggjar høvuðsvinnugreinir, nevniliga: *"Høvuðsvinnur"*, sum er fiskivinnan, alivinnan, fiskavøruídnaður o.l., *"Alment visksemi"*, sum er land og kommunur og *"Avleiddar vinnur"*, sum er ein restbólkur av handilsvinnu, fígging, flutningur, ídnaður o.l.

### Ikki 6 % búskaparvøkstur

Í metingini, sum er víst á myndini, vaksa almennu lønargjaldingarnar við 110 mill. í 2003 í mun til 2002, hetta er 90 mill. sum er ásett í fíggjarlógini, umframt ein mettur vøkstur á 20 mill. í kommununum. Tilsamans er hetta ein vøkstur á 5,8 % í almennum lønargjaldingum.

Høvuðsvinnurnar eru mettar at standa í stað í mun til 2002 - tvs. í metingini er ikki lagt upp fyri, at høvuðsvinnurnar møguliga koma at minka nakað sum fylgju av lækkandi fiskaprísum ella trupulleikum í alivinnuni. Metingin sigur altso, at støðið í høvuðsvinnuni í 2003 verður júst tað sama sum í 2002 - tvs. null-vøkstur. Her skulu vit minnast, at 2002 er eitt rímiliga gott ár hjá høvuðsvinnuni.

At enda er mett um ein vøkstur í avleiddum vinnum á 1,7 % í mun til 2002 - tvs. ein minking í vøkstrinum, men ikki nakað fall.




Samlað gevur metingin ein búskaparvøkstur í 2003 á 2,6%, sum er nakað minni

*Framhald á síðu 13*

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliassen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Rullandi redaktionin:**
tel. 220507

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

*Framhald av síðu 12*

enn tey 6%'ini sum fíggjarmálaráðið metir.

### Skattir og avgjøld

Í metingini vaksa skatta- og avgjaldsinntøkurnar umleið 60 mill. í mun til metingina í fíggjarlógaruppskotinum sum er 120 mill.

Metingin er ikki negativ, tí hon roknar als ikki við nøkrum falli í inntøkunum, men einans at vøksturin er minkaður munandi.

Um henda metingin er røtt, koma sostatt at mangla umleið 60 mill. á inntøkusíðuni á fíggjarlógini.

### Mugu vænta eitt hall á fíggjarlógini

Niðurstøðan kann ikki vera onnur, enn at vit í bestu búskapartíðum mugu rokna við at tá allar útreiðslurnar eru komnar við og inntøkurnar betur eftirfarandi, fer fíggjarlógin at vísa eitt hall í 2003 eins og vit kunnu vænta at tað verður hall longu í ár.

Fíggjarlógin er ein av mest týdningarmiklu lógum Landsstýrið hevur at leggja fram fyri Løgtingið. Fíggjarlógin vísir hvussu Landskassin ætlar at nýta peningin sum kravdur verður inn frá borgarunum. Um samgongan ikki er førð fyri at stýra hesi týdningarmiklu lóg betur enn teir hava víst seinastu árini, hava vit ikki nógv gott í væntu frá hesi samgonguni.

Í tveimum fylgjandi greinum vil eg lýsa aðrar partar av fíggjarlógini, nevniliga hvussu fíggjarlógin er eitt ambod til at javna konjunkturarnar við og hvørjar raðfestingar eru neyðugar á fíggjarlógini um vit skulu arbeiða fram móti einum sjálvberandi búskapi.

Δ

# Lagmanden, hans mand og hans enarmede kone

**Peter O.K. Olofson**
*Klaksvík*



Et muligt fremtidsbillede: Den islandske præsident har beæret os med sit besøg, og Nordens hus er ramme for en officiel middag med lagmanden som vært. Den islandske præsident med ægtefælle er blevet modtaget af lagmanden, hans mand og hans enarmede kone. Der skal bl.a. serveres søpapegøjer og Aurora Borealis skal synge for den islandske præsident med ægtefælle og lagmanden, hans mand og hans enarmede kone.

Spørgsmål: Er dette blot en spøg? En dårlig spøg? Nej, det er blot én af de mange nye muligheder, der kan gives os, når etikken ikke længere skal være teocentrisk men antropocentrisk funderet – altså humanistisk fremfor kristen. Lad os se nærmere på dette.

### En, to, mange

Tidligere byggede samfundets love på den gudgivne skaberorden, hvor mand og kvinde var givet at leve sammen i ægteskab. I dag argumenterer vicelagmanden og andre med ham for et registreret partnerskab for to af samme køn. Normen for etikken flyttes altså fra den gudgivne skaberorden, der udelukker homoseksuelt samliv, til menneskets driftsliv. (Og dette driftsliv kan af den enkelte føles som 'naturligt', også selv om det er imod naturen, sådan er det nemlig i en falden verden.) Da nogle mennesker har en drift imod en person af samme køn, og ønsker at leve sammen, så synes nogle, at vi som samfund dels skal legalisere et sådant samliv og dels sikre dem vilkår nogenlunde på samme vis som ægtefæller ellers. Det handler om retssikkerhed, siger blandt andet vicelagmanden (f.eks. Fregnir 27. sept-3.okt. 2002). Og vé dem, der ikke vil sikre andre deres ret, siger nogle.

Jamen, hvis vi nu legaliserer samliv mellem to voksne af samme køn (homoseksualitet), bliver det næste så ikke, at vi legaliserer samliv mellem en voksen og et barn (pædofili), spørges der. Usmagelig sammenligning! siger nogen. Hvorfor er sammenligningen usmagelig, spørger andre. Er begge dele ikke synd, spørger igen andre. Nogle vil så fremføre, at der i ingen af tilfældene er tale om 'overgreb' (voldtægt), som alle vist stadig er enige om, er utilladeligt. Jamen, det er altid skadeligt for barnet, siger nogen. Hvorfor er det skadeligt for barnet, spørger andre. Skyldes det ikke kun, at vi har defineret det som skadeligt, og dermed belagt det med fobier, der er med til at marginalisere og få mennesker til at føle sig udstødte? Eller er denne skamfølelse, der gør, at det i hvert fald ikke udøves "åbenlyst", en gudgiven samvittigheds påmindelse om, at det ikke er ret at handle således, en skamfølelse, som det ville være en katastrofe at få fjernet?

Mon ikke nogle enkelte ved, at 'Foreningen for bøsser og lesbiske i Danmark' (tidligere 'Forbundet af 1948') havde en pædofiligruppe, der i 1985 blev udskilt til en selvstændig forening. Det var nok lettere at få legaliseret homoseksuelt samliv, hvis man ikke havde pædofiligruppen med i selskabet ('Kærligheden glæder sig ikke over uretten', 1996, s. 34). Og det havde de ret i.

Hvad er forskellen? Jo, forskellen siges at være, at homoseksuelt samliv foregår mellem to ansvarlige voksne og er ikke til skade for andre, og denne etiske norm (ikke-skade) gør, at det ville være ansvarligt at legalisere homoseksuelt samliv men uansvarligt at legalisere pædofile forhold. Det vil sige, at menneskets lyst (drift) sammen med princippet 'ikke-skade' synes at være argumentet for, at homoseksuelt samliv skal legaliseres. Nogle vil nok spørge: Er det ikke skadeligt for de involverede parter selv? Er det ikke et skadeligt forbillede, der legaliseres? Er det ikke samfundets indre opløsning, der påbegyndes? Andre spørgsmål kunne uden tvivl sættes, men lad dem ligge i denne sammenhæng.

Men hvis det er ret at legalisere homoseksuelt samliv ud fra disse præmisser, og at denne legalisering er et spøgsmål om retssikkerhed, så vil jeg gerne spørge Høgni Hoydal: Hvad med de bifiles retsikkerhed? På samme måde som man oprettede en forening særligt rettede mod homoseksuelle og kæmpede for accept af deres levevis, sådan har man siden oprettet en særlig forening for bifile (STOP AIDS, nyhedsbrev nr. 10, maj 1998).

Når driften nu engang er entydigt tvetydig og Søren, Niels og Mette ønsker at indgå registret partnerskab, er det så ikke vores pligt at sikre deres retssikkerhed. Er driften og ikke-skade princippet ikke opfyldt her? Eller hvad mener Høgni Hoydal? Eller hvad mener Kvinnufelagið (jf. Sosialurin d. 4/10-2002) eller de 323 underskrivere (jf. Sosialurin og Dimmalætting d. 21/9-2002)? Eller hvad mener Jóannes Eidesgård, der i SvF syntes åbenlyst irriteret over, at ikke alle socialdemokrater ville følge hans partilinie og legalisere homoseksuelt samliv? Lagmanden, hans mand og hans enarmede kone skal vel have sikret deres ret?

Når man skal prøve validiteten af et etisk normgrundlag, så er det en god ting, ja, det er vel vores pligt, også at se på konsekvenserne: Hvor føres vi hen? Skal lagtinget ophæve den gudgivne skaberorden som gældende for vort samfund, og lægge drift + et muligt ikke-skade princip til grund eller hvad?

Skal vi have legaliseret homoseksuelle forhold og biseksuelle forhold (lagmanden, hans mand og hans enarmede kone), så kommer vi nok heller ikke udenom om polygame forhold (flergifte), det vil sige, at en mand kan have flere koner eller en kone flere mænd. Det handler jo om retssikkerhed!

Jamen, vi går kun ind for at legalisere monogame forhold (forhold mellem to personer), kunne nogle nu sige. Men er det ikke en "fundamentalistisk fordom", der er gået disse i blodet? Har man først forladt den gudgivne skaberorden (der er monogam), så kan man vel ikke først lægge driften til grund for etikken og legalisere homoseksuelle forhold, og siden forkaste driften (bifil eller polygam) og vende tilbage til den gudgivne skaberorden for at fastholde monogamien? Sagt med andre ord: Man kan vel ikke først forkaste skaberordenen (og dermed Bibelen) for at legitimere homoseksuelt samliv for siden at vende tilbage til skaberordenen (og dermed Bibelen) for at forsvare, at partnerskaber kun skal være mellem to (monogame)?

### Lagmandens enarmede kone

Men hvorfor er lagmandens kone dog enarmet? Gik der koldbrand i armen, så den måtte amputeres for at redde hendes liv eller hvad? Nej, hun havde simpelthen ikke lyst til længere at have mere end en arm, så hun gik til lægen og bad om, at den måtte blive amputeret? En kvinde har vel ret til at bestemme over sin egen krop eller hvad? Jo, det har vi hørt gang på gang på gang i den seneste tid (f.eks. Kvinnufelagið, Sosialurin d. 4/10-2002, Annika W. Joensen, Sosialurin d. 30/8-2002 & Dimmalætting d. 3/9-2002). "En kvinde skal have ret til at bestemme over sin egen krop", lyder hærråbet! Og dog. Kommer en kvinde og forlanger sin raske arm amputeret, vil de selv samme mennesker, der er med i koret om kvindens ret til at bestemme over sin egen krop, nok sige nej. Der er nemlig forskel på at få fjernet fodvorter og få amputeret sin raske arm. Ingen vil formodentlig nægte hende retten til at få fjernet sine fodvorter, så her må hun bestemme over sin egen krop. Men enhver (håber jeg) vil nægte at amputere hendes raske arm, så her må hun ikke bestemme over sin egen krop. Her er der skægt nok en sammenfaldende holdning mellem en kristen funderet etik, der fastholder os på at værne om skaberværket, og så drift + ikke skade princippet. Altså selvom kvindens drift er at ville have armen amputeret, så skader hun derved sig selv, og derfor siges der nej. Men er det ikke farligere, hvis hun så gør det derhjemme på køkkenbordet eller går til en kvaksalver for at få det gjort? Jo, uden tvivl. Men det kan vi jo ikke nødvendigvis hindre hende i. Ej heller den gode lagmands kone. Og dét, at vi ikke kan hindre hende i det, er vel ikke ikke et argument for, at så skal vi alligevel give en samfundsmæssig legaliseret ret til at bestemme, om hun vil have sin arm amputeret eller ej, for at det kan ske under "betryggende" forhold. Men se, nu handler det hverken om fodvorter eller amputerede arme, når hæråbet lyder: "En kvinde skal have ret til at bestemme over sin egen krop." Det handler om et andet menneske. Det handler om et barn, en kvinde har undfanget. Jo, forældre bestemmer naturligvis meget for deres børn, men når kvinder i Kvinnufelagið, Annika W. Joensen, m.fl. siger, at de engang var deres mors krop, så er det nok ikke helt rigtigt. Der er nemlig forskel på ens arm og ens barn.

Vælger en kvinde at have samleje med en mand, ja, så har hun brugt sin ret til at bestemme over sin egen krop. Her kan hun nemlig sige 'ja' eller 'nej'. Har hun sagt 'ja', og dette ja resulterer i undfangelsen af et barn, så handler det ikke længere blot om kvindens krop, men om et andet menneske. Et menneske, der både har en far og en mor. En far og en mor, der begge har ansvar for det barn, de er forældre til. En far og en mor, der begge må tage ansvar for barnet.

### Fremtiden

Skal en kommende lagmand, med sin mand og sin (enarmede) kone engang tage imod den islandske præsident med ægtefælle? Ja, se, den mulighed afhænger af de valg, vi foretager i dag. Jeg tror nu, at jeg vælger den gudgivne skaberorden og respekten for menneskelivet…